gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Takk Jefford

Mong vóru tey bæði í USA og úti í heimi, eisini í Føroyum, sum vóru sera vónsvikin, tá amerikanski Hægstirættur, har meirilutin er republikanskur, ruddaði slóð fyri, at USA fekk tann skeiva forsetan. Bush og hansara næstu menn standa fyri nøkrum hugsjónum, ið eru tí annars so stolta amerikanska demokratiinum til lítlan sóma.

Eftir at hava sæð og hoyrt Bush speireka mótstøðumenn og tala niður til fólk, ið dagliga stríðast fyri mannarættindum so sum rættinum til útbúgving, rættinum til sosiala trygd og eini menniskjaligari rættarskipan, verður hann nú at merkja sviðan av sínum egnu gerðum og egna konservativa politikki. Tað er ein av hansara egnu, sum nú sigur, at amerikanska fólkið hevur fingið nóg mikið av konservativa politikkinum hjá víðgongdum republikarum, sum Bush nú av álvara er farin at seta í verk. Maðurin er Jim Jefford, republikanskur senatorur úr Vermont. Hósdagin gjørdi hann av at taka seg úr Republikanska flokkinum og vera uttanveltaður. Tað hevur við sær, at demokratarnir koma í meiriluta í senatinum, og eru tí betri førir fyri at seta fót fyri víðgongda høgrapolitikkinum hjá Bush. Sami Bush, sum royndi at fyrigykla amerikonsku veljarunum, at hann vildi endurnýggja flokkin við at flyta hann frá sera víðgongdum høgrapolitikki til eina meira menniskjaliga konservatismu, hevur gjørt beint øvugt av tí hann lovaði. Við Bush er USA aftur á veg inn í ta myrku og ómenniskjaligu konservativu øldina, sum vit kenna hana frá undanfarnum konservativum forsetum. Og tað er nettupp henda politikkin, sum Jefford ikki longur kann góðtaka.

Avgerðin hjá Jefford er ein sigur fyri tey, ið virka fyri mannarættindum og einum meira menniskjaligum heimi. Bush, sum átti at komið í Guiness fyri at hava sitið sum guvernørur meðan flest deyðadømd eru tikin av døgum, (eisini ósek) er ein vanlukka fyri heimin. Við Bush verða tey veiku og sjúku í USA uppaftur veikari og sjúkari. Skattalættin, sum Bush lutvíst fekk samtyktan, skal fyrst og fremst gagna teimum múgvandi. Og tess færri skattainntøkur tess torførari er at skapa eitt meira rættvíst samfelag fyri allar borgarar, har m.a. útbúgving og sosial trygd eru týðandi partar av demokratiinum. Bush og hansara fólk standa fyri júst tí øvugta av tí, sum annars hummanistar og øll tey, sum arbeiða fyri grundleggjandi mannarættindum og rættvísi stríðast fyri. Størsta broytingin er, at Bush ikki kann seta víðgongdar konservativar hægstarættardómarar. Nú verður hann tvingaður til at leita eftir meira hóvligum, og tað er kanska tað besta, sum kundi henda. Gott í teg Gefford. Tøkk fyri títt dirvi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Mentamálaráðharrin og skúlarnir

**Bjarki Skúvadal,**
*tjóðveldismaður*



Eg las Sosialin í gjár, og tá fall mítt eyga á eina grein, har omanfyri nevndi harri í mentamálum segði sína hugsan um tímatalið, ið var lutað til skúlarnar, og serliga var Vestmanna Skúli nevndur. Eg má siga, at eg fekk ein rimmar skelk. Er hatta maðurin, sum skal standa á odda fyri mentanini í hesum landinum komandi árið??? Mær rann í huga eitt orðafelli, vit plagdu at brúka umborð á skipi fyrr í tíðini: »Nógv fyri at hoyra loppu goyggja og lús hosta!« Í sjeytiárunum nevndu studentarnir í Hoydølum summar menn andaligar amøbur.

Kanska var fyrri maðurin í hasum stólinum nakað seinur at lata munnin upp, men at seta ein skræðugák í staðin?????? Harrin hjálpi okkum!!!

# Nordatlantisk Union – en mulighed

**Et debatoplæg ved Moses Olsen**

Netop i disse år er vi godt i gang med at diskutere selvstændighed i forhold til »moderlandet« Danmark – både på Færøerne og i Grønland.

Det har nok sin rigtighed, når også danske historikere siger, at Danmark aldrig har været ret god til at behandle og forvalte sine kolonier på en ordentlig måde. Når det gælder Grønland, Island og Færøerne er disse lande jo blot kolonier, hvis naturgivne rigdomme staten Danmark helst skal tjene så meget som muligt på, uden at den merværdi, der skabes i kolonierne fordeles på en sådan måde, at den også kommer koloniernes befolkninger til gode. Det drejer sig i sin grundsubstans om udbytning, som vi har mange eksempler på gennem tiderne, og som naturligvis må resultere i en modreaktion.

Island er den første af kolonierne, der sagde fra. Og nu er debatten igang på Færøerne og i Grønland om løsrivelse fra myten om rigsfællesskabet eller rigsenheden med henblik på at skabe sin egen autonomi politisk såvel som økonomisk. Islændinge, færinger og grønlændere er selvstændige folk med eget sprog og egen kultur, som er ganske anderledes end det danske sprog og kultur. Med andre ord er Island, Færøerne og Grønland usammenlignelige størrelser i forhold til Danmark.

Vi har aldrig bedt om at blive koloniseret. Vi har aldrig solgt vore lande til Danmark eller et andet land. Men ifølge det danske Riges Grundlov, hvis tilblivelse eller ændring vi ikke har haft indflydelse på, er Færøerne og Grønland for tiden en del af den såkaldte rigsenhed. Men nu rumler det med løsrivelse fra Danmark eller en eller anden form for selvstændighed både på Færøerne og i Grønland. Hvad er så de reelle muligheder?

Den ene mulighed er, at staten Danmark anerkender Færøerne og Grønland som selvstændige folk med fuld ejendomsret til landet og alle landets ressourcer og udnyttelse af disse, hvorefter man etablerer en føderation mellem selvstændige tre stater, som fungerer samlet udfra deres egne forudsætninger, men under samme kongedømme – Commonwelth, om man vil.

Den anden mulighed er, at der etableres Nordatlantisk Union (NAU), som i sin grundsubstans bygger på samme principper i USA eller EU.

Hvis Island, Grønland og Færøerne indgik i en NAU vil vi tilsammen få overherredømme over den overvejende del af de Nordatlantiske søterritorier, som er i stand til at levere friske og ikke forurenede varer fra havet, hvor den øvrige del af verden kommer til at mangle sådanne varer som følge af den verdensomspændende menneskeskabte forurening. Med andre ord ville NAU stå i en stærk position i forhold til andre lande. Derudover ville vore Nordatlantiske lande stå i en stærk position i forhold til såkaldte industrialiserede stater, idet vore lande har potentieller vedrørende olie, vand og ædle metaler, som resten af verden kommer til at mangle på et givet tidspunkt.

Derfor er det efter min mening værd at overveje, at vore Nordatlantiske lande – måske i første omgang de tilbageværende »kolonier« Færøerne og Grønland – vurderer mulighederne for etablering af NAU. Hvis Island, som også er udenfor EU, kan komme med, har vi mulighed for en stærk NAU gennem samordnet fiskeri- og afsætningspolitik, fælles prispolitik m.v. Hvis vi kan finde en håndtærbar samarbejdsform, vil vi i Nordatlanten blive i stand til at hævde os med vægt i international sammenhæng på fiskeriområdet. Derudover rummer Nordatlanten mange naturressourcer, som vi der bor her, må kunne disponere på en sådan måde, at de bliver til gavn for os. Vi har nu valgt at bo i Nordatlanten.

Globaliseringen griber om sig. På trods af udbytning fra kolonistaten har vi i Nordatlanten overlevet i tusinder af år. Skal vi forberede os på globaliseringen, vil det være bedst med at starte med Nordatlantiseringen af alle vore ressourcer.

**Moses Olsen**

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult9 cyan9 magenta9 svart9



## VIÐMERKINGAR

# Javnstøðunevndin svarar Fólkaflokkinum

**Vegna Javnstøðunevndina**
*Turið Debes Hentze, fork.*



Í viðmerkingini frá Fólkaflokkinum til Javnstøðunevndina um ætlaða skattalættan til giftar menn, eru so nógvir skeivleikar og beinleiðis ósannandi, at ein rættleiðing er neyðug:

- Tað er ikki rætt, at verandi skattalóg ger mun á giftum kvinnum og ógiftum, tí báðar skulu gjalda skatta av inntøkum sínum. Og er ongin inntøka, er ongin skattur at gjalda. Tann heimaarbeiðandi húsmóðirin, ið onga inntøku hevur, rindar tí heldur ikki skatt.
- Tað er heldur ikki rætt, at maðurin verður revsaður, tí at konan ikki hevur inntøku. Hann rindar skatt, sum einhvør annar sambært skattaskipanini. Hann hevur hin vegin eina konu heima, sum syrgir fyri honum, húsi og børnum. Hesa veiting fær hann skattafría, og afturfyri undirheldur hann fíggjarliga konu og børnum, og hesum rindar hon hinvegin heldur ikki skatt av. So kann altíð spyrjast, hvussu hesar veitingar viga upp móti hvørji aðrari fíggjarliga og í aðrar mátar. Men soleiðis hava tey skipað seg.
- Tað er heldur ikki rætt, at verandi lóg tvingar fólk at skilja seg. Tann gifta kvinnan við ongari inntøku verður ikki betri fyri skattliga, um hon verður skild, tí um hon onga inntøku hevur, rindar hon framvegis ikki skatt tá. Heldur verður hon verri fyri, tí at hon tá ikki longur skattafrítt kann fá pengar ella annað uppihald goldið frá manninum. Nú eru hesir pengar skattskyldugir.
- Tað er óseriøst, og hevur ikki annað endamál enn at grugga skattamálið og viðgerðina av hesum, at tosa um hjúnabandsstøðuna innan almannalóggávuna. Ivaleyst er har okkurt at tosa um eisini, men hevur tað onki við ætlaða skattalættan at gera.

Í proklamatiónini frá Fólkaflokkinum verður sagt, at Javnstøðunevndin loypir á familjuna, hjúnalagið og giftu barnamammurnar. Hetta er eisini skeivt!

Ørindini hjá javnstøðunevndini vóru at vísa á, at um endamalið við skattalættanum var at lívga um barnafamiljuna, so skuldu allar barnafamiljur takast við og ikki bert tey giftu. Børnini skulu ikki revsast fyri at foreldrini ikki eru gift, og tað eru børnini, sum eiga at vera kjarnin í hesum máli. Og tá umleið annaðhvørt barn í dag verður føtt uttan at mamman er gift, so tosa vit um nógvar familjur ella forsyrgjarar.

Ørindini vóru eisini at vísa á, at kvinnan, sum tann fíggjarligt veikari parturin í hjúnalagnum skal ansa sær, ikki at vera nýtt á ein hátt, sum ikki gagnar henni meiri enn kanska bara beint her og nú. Hon skal ikki viðgerast sum eitt viðhang hjá manninum, men sum ein sjálvstøðugur persónur. Og tá at vísa á, at framtíðin hjá teimum ungu kvinnunum ikki liggur í húsmóðirarbeiðinum burturav, men í útbúgving og arbeiðsinntøku, sum gevur persónligt og fíggjarligt frælsi.

Illgrunin um, at uppskotið í veruleikanum er skattaspekulatiónspolitikk - ur ílatin sum familjupolitikkur, er bert styrktur aftaná at viðmerking fólkaflokksins, sum hevur hetta at bjóða ta heimaarbeiðandi konuni: at passa egnu børnum sínum og spara samfelagnum fyri milliónaupphæddir í alm. barnaansing. Afturfyri skal maðurin fáa skattalætta.

Og tá Sambandsflokkurin sigur, at tað eru fleiri konur, sum ikki sleppa út at arbeiða, at tær fáa ikki børnini ansaði, kann bara spyrjast, jamen hvat hjálpir skattalættin uppá tað. Var so ikki vert ístaðin at umhugsa fleiri og betri ansingarmøguleikar. Tað tykist veruliga, sum at hesir flokkar ynskja at halda kvinnunum heima fyri at spara ansingarpláss. Um kvinnurnar spara samfelagnum milliónaupphæddir, sum sagt verður, og ynski er framhaldandi, um at halda teimum heima uttan valmøguleika at fara út í arbeiði, tí ansingarstovnar ikki skulu gerast, so skuldi vera lagamanni at útgoldi hesum kvinnum veruligar almennar lønir, sum eru at liva av (skattalætti er eisini almennur peningur) og ikki bert teir smáu lokkubitar, sum higartil hava staðið teimum í boðið. Og hesar lønir skulu gjaldast beinleiðis til tær smábarnamammur (ella teir pápar), sum gera arbeiðið og ikki umvegis hin hjúnafelagan. Talan verður tá um eina løn ella sosiala veiting, sum ikki viðvíkir skattalógini.

Er talan um sosiala veiting, sum ávirkast av hjúnabandsstøðuni, so minkar upphæddin á veitingini tess størri inntøku hin hjúnafelagin hevur og veksur tilsvarandi, um hjúnafelagin hevur lítla inntøku. Tá verður úrslitið tað løgna og júst tað øvugta av tí, ið skattauppkotið hevði við sær. Tá fáa tey mest trongjandi meir burturúr og tey við hægri inntøkuni minni, og ikki sum sambært skattauppskotinum, at bert tey við ávísari høgari inntøku fáa ágóða.

Annars var grundsjónamiðið í skrivinum frá Javnstøðunevndini: Latum okkum fáa tað, sum tørvur er á í samfelagnum. Fáa barnaansing, stuðul til børn og tongjandi og skipa so fyri, at bæði kvinnur og menn fáa møguleika fyri at sameina familjulív og arbeiðslív uttanfyri heimið, tí tað verður framtíðarkravið hjá teimum komandi familjunum.

# Er Zakaris Wang hvør sum helst?

**Hans Jørgensen**



Í Dimmalætting seinasta leygardag fingu øll Føroya fólk møguleikan at síggja, hvørji ótrúlig evni, Zakarias Wang hevur, tá tað snýr seg um at gera logiskar niðurstøður. Sum ein annar Erasmus Montanus, fekk hann tað til, at Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, hevði ábyrgdina av, at løgreglan, vápnað til tenninar, legði upp í blokadurnar hjá Føroya Arbeiðarefelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag. Og grundgevingin var sára einføld. Jóannes hevði ikki peikað á eina borgarliga stjórn í Danmark eftir seinasta fólkatingsval, men á sitandi stjórn, sum løgmálaráðharrin er partur av. Ergo hevði hann ábyrgdina, ljóðaði niðurstøðan hjá Zakariasi Wang.

Hóast Zakarias Wang alt sítt lív hevur tikist við samfelagsfrøði, so kom tað ikki honum til hugs, at boðini til løgregluna um at berja blokadurnar niður, vóru komin frá onkrum myndugleika her á landi. Tað kom honum ikki til hugs, at tað landsstýri, sum hann í óteljandi greinum hevur lovprísað, kundi havt givið boðini. Men tað er kanska ov nógv at krevja av Zakarisi Wang?

Óli P gav henda dagin í Sosialinum sína viðmerking til greinastubban frá Zakarisi Wang við enn einari framúr tekning, og flestu føroyingar hava eisini tikið greinastubban hjá Zakariasi Wang sum eina stuttliga viðmerking frá einum skemtara.

Men er Zakarias Wang hvør sum helst? Er hann bert ein skemtiligur greinskrivari? Nei, tað er hann so sanniliga ikki. Hann er ein av sjefideolugum hjá Tjóðveldisflokkinum og hjá sitandi fullveldissamgonguni. Tað er hesin sami Zakrarias Wang, sum tá á hevur staðið, hevur givið Tjóðveldisflokkinum og samgonguni politiska kraftfóðuri til framhaldandi at finna túsund góðar orsøkir til at halda fast við, at danir bert hava havt skaðiliga ávirkan á okkara land.

So kanska segði hasin greinastubbin hóast alt ikki heilt einki.

# Vártónar í Fuglafjarðar kirkju

**UMMÆLI**
*Signar á Brúnni*
*11. mai - 2001*

Nú várið kom við sínari lýðku,gróðri og fuglasangi skipaði Fuglafjarðar Sangkór og Fuglafjarðar Hornorkestur fyri konsert í Fuglafjarðar kirkju 6.mai klokkan 16.Áhugin millum fuglfirðingar fyri sangi og tónleiki hevur altíð verið stórur, og tað vísti eisini henda løtan í kirkjuni. Væl av fólki varð møtt, og nógv vóru tey, ið luttóku í framførsluni. Eisini fólk uttanfyri Fuglafjørð, høvdu leitað sær higar at lurta eftir konsertini.

Nú Frits Johannesen er á flatlondum í lestrarørindum, hevði Jógvan á Lakjuni tikið yvir. Maður kemur í mans stað, plaga vit at siga, og hóskaðu hesi orð væl í hesum føri.

Leiðari hjá Hornorkestrinum var Sharon Fisher, ið hevur leitt orkestrið í nøkur ár.

Skráin var áhugaverd. Fyrst sang kórið fimm sangir. Síðani spældi Hornorkestrið fýra løg.

Til seinast endaði sangkórið við seks sangum/ sálmum..

Sum væntað, vóru flest øll løgini vár og summarløg.

Knút Olsen átti ikki færri enn tey fýra løgini, ið sungin vórðu. Aftur birtist lív á landi var fyrsti sangurin, ið kórið sang. Mikkjal á Ryggi átti orðini og Knút Olsen lagið.Næsta lagið, ið Knút átti var til sangin hjá Tummasi Napoleon Djurhuus — Nú strýkur vár. Triðja lagið hjá Knúti, var til sangin hjá Hans Jákup Glerfoss, ið kallaðist Juni. Seinasta lagið hjá Knúti var til sálmin hjá Louis Zachariassen Kom friður av himni. Knút man vera ímillum teir allarbestu her á landi, tá ið talan er um at gera songløg. Orðini í nevndu sangum og sálmum eru vøkur, og løgini, ið Knútur hevði gjørt til teir, hóskaðu sera væl.

Eitt annað lag ið hugtók mong, var lagið til sangin hjá Andreas Ziska Eitt lítið fjallaland.Magnus Jacobsen — Magnus hjá Nelly, sum fuglfirðingar plaga at siga — hevði gjørt lagið. Magnus er kendur sum sangari og solospælari ( ein sannur gittarsnillingur ) í Absurdi Fair. Enn einaferð vísti hann, hvussu gávuríkur hann er á tónleikaøkinum. Í løtuni er hann í Danmark og undirvísir í tónleiki.

Vónandi fara vit í framtíðini at hoyra meira til henda gávuríka tónleikara.

Kórleiðarin Jógvan á Lakjuni átti lagið til sálmin Ljósið svinnur yvir fjøll og fløtur, ið abbin Victor Danielsen hevði umsett. Eitt yndisligt lag til vakran sálm.

Annars vóru tað løg hjá Jens Guttesen, Jógvani Waagstein, John Højby og Jessie S.Irvine, ið sungin vórðu.Øll sera løtt og vøkur løg.

Tey 29 fólkini, sum luttóku í kórsanginum, komu væl frá framførsluni. Røddirnar vóru góðar og reinar, og kórleiðarin hevði vant kórið soleiðis, at eingin rødd skuldi hoyrast fram um aðra. Hetta eydnaðist til fulnar, og m.a. tí gjørdist sangurin so góður.

Hannis á Brúnni Hansen og Linda Toftegaard sungu solo í hvør sínum sangi. Hannis við síni kraftmiklu og vøkru rødd sang tað eina ørindi í sanginum Nú strýkur vár, og kom hann, sum altíð, sera væl frá síni uppgávu.

Linda Toftegaard sang solo í sanginum Mín hirði góður Harrin er. Linda hevur eina yndislig rødd. Hon hevur nú í mong ár sungið í kóri bæði í Føroyum og í Danmørkini og harvið lært at nýta síni evni.

Hon hugtók allar lurtararnar henda dagin.

Fuglfirðingar hava havt Hornorkestur í mong ár. Leiðarin er Sharon Fisher. Orkestrið spældi fýra løg, ið ikki øll vóru so løtt at framføra.Orkestrið kom sera væl frá síni framførslu, nakað av tí besta tey nakrantíð hava víst.Kenda lagið hjá Lennon & McCartney Here, There, and Everywhere ljóðaði stak væl. Tann nú eftirhondini kendi, ungi og gávuríki tónleikarin Jóhan Hentze royndi seg enn einaferð sum solist,og kom hann sera væl frá tí. Hornorkestrið skuldi átt framtíðina fyri sær, tí har eru so nógv evnarík ungfólk, ið luttaka, ið verða stuðlaði av teimum, ið hava drúgvar royndir.

Leiðarin Sharon Fisher hevur fingið ótrúliga nógv burturúr síni undirvísing, og hevur gott tak á orkestrinum.

Samanumtikið skal verða sagt, at várkonsertin í Fuglafjarðar kirkju eydnaðist sera væl.